LM-099/2023

Fylgiskjal 21
1.

Hoyringssvar til uppskot til løgtingslóg um burðadygga ferðavinnu

Hagastýrið fyri Lítlu Dímun hevur gjøgnumgingið lógaruppskotið og hevur hesar viðmerkingar:

Um virksemið í Lítlu Dímun

Lítla Dímun hevur havt burðardygga ferðavinnu í nógv ár.

Síðan 2006 hava vit uppbygt eina niðurfalna oyggj, har vit hava gjørt skipaðar ferðir við føroyskum ferðafólkum.

Grundin til, at vit fóru undir skipaðar ferðir, var óskipaðu viðurskiftini hjá útbjóðarum av túrum út í oynna. Mannalagnur kundu staðist av hesum.

Fyri at steðga hesum óskipaðu ferðatilboðum út í oynna, tóku vit stig til sjálvir at skipa fyri ferðafólkaferðum.

Okkara túrar eru sera væl umtóktir og oyggin hevur saman við okkum verið væl vitjað. Vit seta altíð trygdina í hásæti, bæði viðvíkjandi streymviðurskiftum rundan um oynna, veðurlíkindi og hvussu gingið verður í brattlendinum.

Aldursmarkið er 14 ár at koma í oynna, og tað er ikki av tilvild, tí tá er ein persónur blivin nóg sterkur til at klára lættastu gongdina í oynni.

Tað jaliga við hesum túrum er eisini, at tann peningurin, vit fáa inn, allur verður brúktur uppá oynna, uppgongdir blivu gjørdar og hetta tók nøkur ár.

Allur peningurin fer til Lítlu Dímun og eigarar tjena ongar pengar av ferðavinnuni, soleiðis er okkara politikkur.

Sjálvt um vit eru fáir, samanborið við Føroyar, eru tað nokk bert vit lokalu Dímuningar, ið duga at meta um, út frá føroysku náttúruni, nær mann kann fara í oynna, og vita hvussu farast skal á oynni.

Vit meta tað vera ein dáragerð, um lokal/fremmand saman við øðrum fremmandum skulu avgerða, hvussu farast skal á Lítlu Dímun.

Vit seta trygdina í hásæti og okkara royndir vísa heilt klárt, at tað er ongin munur á føroyingum og útlendingum.

Bæði føroyingar og útlendingar skulu hava líka tænastu frá okkum, fyri at ferðast trygt og eisini kenna seg tryggan í oynni.

Hetta gjalda teir fyri, og hetta er tað, ið ger, at Lítla Dímun er væl hildin í dag.

Út frá áralongum royndum er tað okkara fatan, at eingin má fara út í Lítlu Dímun uttan saman við einum staðkendum ferðaleiðara, sum er góðkendur av stýrinum í Lítlu Dímun.

Tað er eigarin, sum hevur ábyrgdina, um skaði hendir.

Lítla Dímun er als ikki egnað til frælsa gongd, hvørki fyri føroyingar ella útlendingar, so langt frá tí.

Ítøkiligar viðmerkingar til uppskotið

Útgangsstøðið í lógaruppskotinum er, at tað verður einum og hvørjum frítt at ferðast út í oynna.

Hetta framgongur av § 3 í uppskotinum, sum er soljóðandi:

§ 3. Við teimum avmarkingum og skyldum, sum eru ásettar í hesi løgtingslóg, í reglum, givnar við heimild í hesi løgtingslóg ella í øðrum løgtingslógum og fyriskipanum, er einum og hvørjum frítt at ferðast uttangarðs og fram við strondini

Hesa áseting kunnu vit ikki góðtaka um hon eisini umfatar Lítlu Dímun..

Tað ber ikki til at loyva fólki út í Lítlu Dímun uttan saman við staðkendum og góðkendum ferðaleiðara.

Vit eru greið yvir, at grein 3 í lógaruppskotinum bert er eitt útgangsstøði. Har eru rættiliga nógvar avmarkingar, sum vit annars í prinsippinum taka undir við.

Uppskotið skilur á ein hátt millum vanliga gongd í náttúruni og so handilsliga ferðavinnu.

Eftir uppskotinum kann handilslig ferðavinna bert útinnast í samráð við eigara, tó soleiðis at eigarin ikki hevur óavmarkaðar heimildir bara at nokta fyri handilsligari ferðavinnu.

Eigarin skal sambært uppskotinum hava serligar orsøkir at nokta fyri handilsligari ferðavinnu, t.d. at fjallgonga v.m. forðar fyri, at túrur verður gjørdur.

Tá Lítla Dímun um ræður, ber ikki til at hava slíka áseting.

Orsøkin er, at tað av trygdarávum ikki er forsvarligt at lata fólk ganga óskipað í oynni.

Tað má verða eigarin av oynni, sum skal geva loyvi til, at fólk kunnu fara í oynna, eisini tí at eigarin kann ábyrgjast, um onkur vanlukka hendur. Avgerðarrættur og ábyrgd mugu fylgjast í einum slíkum føri.

Vit taka tí ikki undir við § 5, stk. 2 í uppskotinum, soleiðis sum hetta er orðað:

§ 5. Uttan mun til ásetingina í § 3 kann handilslig ferðavinna bara útinnast í samráð við eigara ella brúkara.

Stk. 2. Ásetingin í stk. 1 gevur ikki eigara ella brúkara heimild at nokta fyri virksemi eftir stk. 1, sbr. tó § 12, stk. 3, men eigari ella brúkari kann krevja, at standardavtala eftir stk. 3 er gjørd frammanundan.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin ger standardavtalu, sum er galdandi fyri virksemi eftir stk. 1.

Lógaruppskotið hevur sum fyritreyt, at øll økir í landinum skulu gera eina ferðavinnuætlan.

Tað verður viðkomandi kommuna saman við eini staðbundnari nevnd, sum avgerð, hvussu ferðavinnan verður løgd til rættis.

Í samband við ferðavinnuætlanina er møguligt hjá staðbundna myndugleikanum at banna allari ferðavinnu í einum ávísum øki av trygdarávum, sí viðmerkingarnar niðanfyri.

Hetta framgongur av § 6 í lógaruppskotinum, sum er soljóðandi:

§ 6. Allar kommunur skulu, saman við serstøku ella staðbundnu nevndini, sbr. § 7, og í samráð við eigara ella brúkara, gera eina ferðavinnuætlan, har ferðavinnuvirksemið í kommununi verður greinað, eins og gerast skal ein ætlan fyri, hvussu ferðavinnan á staðnum verður ment og fyriskipað á skynsamasta hátt samsvarandi endamáli løgtingslógarinnar. Ferðavinnuætlanin skal røkka út á kommunumark.

Viðmerkingarnar til hesa lógargrein siga m.a:

Í fyrsta lagi er umráðandi, at almennar farleiðir í kommununi, t.e. farleiðir, har ein og hvør hevur frítt at fara, undir hesum bygdagøtur og aðrar gøtur, og onnur øki, sum eru opin fyri almenninginum, verða lýstar.
Somuleiðis skal kommunan meta um, hvørt tað er neyðugt og skynsamt at gera nýggjar gøtur og farleiðir til almenningin. Nýggjar gøtur kunnu, eins væl og bygdagøtur og aðrar gøtur, beina ferðsluna ta leiðina, sum órógvar annað virksemi, t.d. landbúnaðarvirksemi, sum minst. Umframt at lýsa verandi og komandi leiðir skal ferðaætlanin eisini lýsa, um ávísar leiðir eru soleiðis háttaðar, at tær av trygdarávum ella verndarávum eiga at vera stongdar fyri almennari ferðslu.

Í slíkum førum kann verða talan um at steingja ávísar leiðir ella ávís øki part av árinum ella part av samdøgrinum, t.d. á hávetri í ringum líkindum ella í bútíðini hjá fugli.
Tá mett verður um, hvørt leið ella øki eigur at verða stongt fyri almennari ferðslu, skal gerast ein torleika- og váðameting. Hetta kann gerast við at litmerkja leiðir, t.d. at marka lættar leiðir grønar og truplar leiðir svartar. Givið er eisini, at ávísar leiðir, tó at tær eru almennar, eru so vandamiklar at ganga, at ókunnufólk mugu ikki fara einsamøll. Tá slíkar leiðir um ræður, skal kommunan, saman við staðkendum fólkum, meta um, hvørt staðkendur ferðaleiðari er ein treyt fyri at ganga leiðina.

Vit halda tað vera skilagott við slíkum ásetingum.

Tað er neyðugt at planleggja, hvar ferðafólk kunnu fara, hvørji útferðarmálini skulu verða, neyðugar gøtur mugu gerast v.m. Tað er sum heild neyðugt, at fáa lagt ferðavinnuna í eina trygga legu, eisini tí ferðavinnan kann gerast eitt gott íkast til okkara búskap.

Men í síðsta enda má tað vera eigarin, sum skal avgerða, um atgongd til hansara øki kann loyvast av trygdarávum.

Lógaruppskotið ásetur somuleiðis, at farleiðir skula merkjast v.m.

§ 8 í uppskotinum er soljóðandi:

§ 8. Kommunan skal í samráð við eigara og brúkara, viðkomandi myndugleikar og stovnar merkja upp farleiðir og gera nýggjar farleiðir til tess at skipa ferðsluna uttangarðs.

Hesi áseting kunnu vit taka undir við.

Í uppskotinum eru serligar reglur um trygd, og at ferðafólk í ávísum økjum bert kunnu ferðast saman við einum ferðaleiðara, sum skal vera staðkendur. Tað er ikki eigarin, sum tekur støðu til hetta, men ferðavinnumyndugleikin.

Hetta framgongur av § 11 í uppskotinum, sum er soljóðandi:

§ 11. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta reglur um, at tað í økjum, har serliga vandamikið er at ferðast, bara skal vera loyvt at ferðast við staðkendum fólki.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta, at serliga vandamikil øki av trygdarávum skulu vera heilt ella partvíst stongd fyri ferðslu ávísa tíð á árinum ella samdøgrinum.

Viðmerkingarnar til hesa lógargrein siga soleiðis:

Øll ferðsla í haganum kann vera vandamikil, og tí verður altíð ferðast undir egnari ábyrgd. Onkustaðni kann tó vera serliga hættisligt at fara, um ein ikki er staðkendur.

Í slíkum førum kann landsstýrismaðurin í kunngerð áseta reglur um, at øll, sum ferðast í økinum, skulu hava onkran staðkendan við sær.

Við staðkendum verður hugsað um fólk, sum kenna umstøðurnar á staðnum og eru von at ganga har. Somuleiðis kann tað summastaðni vera vandamikið at ferðast í t.d. myrkri ella hálku, og í slíkum førum kann landsstýrismaðurin eftir stk. 2 steingja økið ávísar tíðir á samdøgrinum ella árinum.

Vit kunnu taka undir við hesum ásetingum, men vit halda, at ein slík kunngerð altíð eigur at verða gjørd í samráð við eigaran.

Lógaruppskotið leggur upp til, at tað ikki longur kunnu setast forðingar fyri, at fólk kunnu fara í náttúruna at ganga v.m.

Hetta framgongur av § 12, sum er soljóðandi:

§ 12. Ikki er loyvt eigara ella brúkara við gjaldsportri, stongsli ella á annan hátt at forða fyri lógligari atgongd ella gera tað trupult hjá fólki at útinna síni rættindi eftir hesi logtingslógini.
Stk. 2. Eigari ella brúkari kann ikki uttan serstaka heimild við skelti ella á annan hátt kunngera forboð fyri lógligari ferðslu og uppihaldi.
Stk. 3. Eigari ella brúkari kann, hóast ásetingarnar í stk. 1-2, avmarka ferðslu og uppihald, sum órógva serligt landbúnaðarvirksemi ella veiðu, t.d. fjallgongu og haruveiðu. Avmarking eftir 1. pkt. skal vera so avmarkað sum gjorligt.
Stk. 4. Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri reglur um, hvussu slíkar avmarkingar verða almannakunngjordar.

Hesa áseting kunnu vit taka undir við.

Niðurstøða

Samanumtikið kunnu vit í prinsippinum taka undir við:

1) at handilslig ferðavinna skal fara fram í samráð við eigaran, men vit meta samstundis, at eigarin einsamallur av trygdarávum eigur at kunna nokta fólki at koma út í oynna. Hetta uttan mun til, um talan er um vanliga gongd ella skipaðar túrar innan ferðavinnuna.

2) at gjørd verður ein ferðavinnuætlan. Ætlanin skal gerast eftir uppskoti frá eini staðbundnari nevnd. Í viðmerkingunum verður nevnt, m.a. soleiðis: "*umframt at lýsa verandi og komandi leiðir skal ferðaætlanin eisini lýsa, um ávísar leiðir eru soleiðis háttaðar, at tær av trygdarávum ella verndarávum eiga at vera stongdar fyri almennari ferðslu.*"

Hesum taka vit undir við, undir teirri fortreyt, at eigarin av oynni einsamallur kann nokta ferðafólki út í oynna av trygdarávum.

3) ásetingini í grein 11, har serligar reglur verða gjørdar um trygd, og at ferðafólk í ávísum økjum bert kunnu ferðast saman við einum ferðaleiðara, sum skal vera staðkendur. Henda áseting eigur at vera galandi uttan undantak fyri Lítlu Dímun.

Vit vóna at landsstýrismaðurin tekur okkara viðmerkingar við í víðari viðgerðini av málinum, og broytir uppskotið samsvarandi hesum.

Hvalba, tann 21. februar 2024

Hagastýrið fyri Lítlu Dímun

Róin Schrøter